## Kanska ikki einsamallur

Wolfgang Priklopil var kanska ikki einsamallur um at burturflyta tað tá 10 ára gomlu Nataschu Kampusch. Løgreglan í Wien hevur sett saman ein nýgjan bólk av detektivum, sum skal kanna málið gjøllari. Ein húsameklari er undir illgruna, og bleiv tað longu fáar dagar eftir, at Kampusch hvarv. Eisini er mamma at Nataschu Kampusch, Brigitta Sirny, undir illgruna. Tað heldur í hvussu er ein pensjóneraður Dómari, Martin Wabl, sum heldur, at mamman framdi skipaðan kynsligan ágang móti dóttrini, og at ótta fyri at verða avdúka skipaði hon fyri burturflytingini saman við Wolfgang Priklopil.



## 6,7 milliardir upp í royk

Myndin er frá februar mánað, men tær eru nústaðni almannakunngjørdar av amerikanska verjumálaráðnum, og nú liggja upptøkurnar á YouTube. Tær vísa eitt B-2 bumbuflogfar, sum undir fráferð á Andersen Air Force Base á Guam, fær trupulleikar. Tá vinstri vongur tekur í jørðina, skjóta flogskipararnir báðir seg úr flogfarinum, sum stutt eftir rakar jørðina og eldur kemur í. Flogskipararnir fingu bert smærri snuddir, men flogfarið, sum kostar 6,7 milliardir krónur, gjørdist vrak.

# Allur fiskiflotin lagdur á ólavsøku

**Fiskiflotin livir nú av náði og miskunn frá bankunum. Kemur ikki álvarslig vend í, fer tað allarmesta av fiskiflotanum at liggja bundin við bryggju longu á Ólavsøku, sigur formaðurin í Reiðarafelagnum**

FISKIVINNA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Her liggja fiskiskip bundin á rað við bryggju á Tvøroyri og enn eru ongi útlit til, at tey loysa aftur. Viberg Sørensen sigur, at longu á ólavsøku verður hetta vanlig sjón um alt landið*

- Hendir onki heilt alvorligt, verður næstan allur fiskiflotin lagdur longu á ólavsøku.

So dapurskygdur er Viberg Sørensen, formaður í Reiðarafelagnum, um støðuna í fiskivinnuni.

Oljan bara dýrkar og dýrkar og skipini fáa ikki samanhang í sjálvan raksturin.

- Tað er raksturin túr fyri túr, sum ikki longur hongur saman og tá er slett ikki talan um at betala rentur og avdráttir, tí tað er ikki hugsingur um at betala, sum støðan er nú.

Tað merkir, at hóast skipini ikki leggja upp fyri rentur og avdrátt, hava tey kortini hall av hvørjum túri, tí tey fiska nóg illa fyri olju og tískil enn minni fyri hýru og útgerð afturat.

Hetta hevur longu ført við sær, at nógv teir flestu lemmatrolararnir longu eru lagdir.

Einastu lemmatrolarar, sum enn eru í fiskiskapi, eru Steintór og Sjagaklettur úr Hvalba, Suðringur av Tvøroyri og Bresti úr Havn.

Annars liggja hinir níggju lemmatrolararnir bundnir við bryggju, tí tað loysir seg ikki at fiska longur.

Men Viberg Sørensen sigur, at støðan hjá øðrum skipabólkum er líka ring og tað er bara ein spurningur um tíð, áðrenn tað mestsum allur fiskiflotin verður lagdur.

-Støðan hjá partrolarunum er nú eisini so vánalig, at teir fáa heldur ikki raksturin at hanga saman.

### Liva av náði og miskunn

Viberg Sørensen staðfestir, at sum støðan er nú, livir fiskiflotin av náði og miskunn frá peningastovnunum, men tað kann ikki ganga longi afturat.

- Mítt sannførda boð er, at hendir onki heilt avgerðandi nú, vera tað ógvuliga fá skip, sum sigla bara um tveir mánaðir.

Sostatt er vandi fyri, at tað mesta av fiskiflotanum fer at liggja við bryggju longu á ólavsøku, tí tað loysir seg ikki at fiska longur.

- Støðan er avgjørt ikki stórt frægari hjá flotanum, sum heild og hjá partrolarunum er hon eisini serdeilis vánalig.

Annars hevði Reiðarafelagið aftur fund við landsstýrið í fyrradagin um støðuna í fiskiflotanum.

Men tað var bara ein kunnandi fundur og Viberg Sørensen veit ikki, hvat fer at henda.

- Men tað er lítil og ongin glotti fyri framman, leggur hann afturat.

Hinvegin verður framvegis ikki tosað nakað sum helst um studning til fiskivinnuna.

- Tað er ikki ein spurningur, sum er til viðgerðar og vit hava eisini fingið greið boð úr landsstýrinum um, at studningur kemur ikki upp á tal.

Hinvegin ásannar formaðurin í Reiðarafelagnum eisini, at trupulleikin í fiskivinnuni er so mikið stórur, at hann verður ikki loystur við at lække hýrurnar nøkur prosent.

- Hetta er ikki ein trupulleiki, sum reiðarar og manningarfeløg kunnu loysa sínamillum við at lække hýrurnar, tí tað ger alt ov lítlan mun, staðfestir hann.

Annars hevur løgmaður sagt á tingsins røðarapalli, at onki er so ringt, at tað ikki er gott fyri okkurt og at hetta er eitt givið høvið til at laga fiskiflotan til umstøðurnar?

- Tað havi eg ongar viðmerkingar til, sigur Viberg Sørensen.

# Tilboðið munar púra onki

**Tilboðið frá manningunum á lemmatrolarunum til reiðararnar fyri at fáa teir aftur til fiskiskap, munar púra onki, og tí liggja skipini framvegis**

FISKISKAPUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Manningarnar á lemmatrolarunum eru til reiðar at fara niður í løn fyri at hjálpa trolarunum at fara aftur til fiskiskap

Men tað munar púra onki.

Tað, sum, manningarnar hava bjóðað sær til, er at lække hýruna eitt prosent frá nú av til 1. november. Sostatt skal hýran lækka úr 27% niður í 26%.

Tað var úrslitið eftir kreppufundin á Tvøroyri síðsta hóskvøld

Men sum skilst, var tilboðið ikki ókeypis, tí afturfyri skulu reiðarar binda seg til at syrgja fyri, at allir sáttmálar verða hildnir.

Hetta váttaði Eyðstein Djurhuus, formaður í Skipara-og navigatørfelagnum fyri Rás2 á miðdegi.

Hann sigur, at treytin frá manningunum fyri at fara niður í hýru, er, at reiðarar ikki gera sáttmálar við einstøk skip.

Síðani kreppufundin á Tvøroyri er onki hent og reiðararnir hava ikki svarað tilboðnum frá manningarfeløgunum.

Men ein orsøk kann vera, at reiðararnir halda, at tilboðið er so vánaligt, at tað ger hvørki frá ella til.

Viberg Sørensen, formaður í Reiðarafelagnum vil ikki gera viðmerkingar til tilboðið.

Men hann staðfestir eisini, at hóast allur bati bøtir, er hetta so lítið, at tað munar púra onki.

Aðrir reiðarar siga, at kravið frá manningarfeløgunum um at halda sáttmálarnar, ber rætt og slætt ikki til at ganga á møti, tí teir kunnu ómøguligt ansa eftir, at manningar gera serligar avtalur.

- Tað verður ikki hetta, sum fær lemmatrolararnar aftur til fiskiskap, tí tað skal nógv meiri til, leggur hann afturat.

Poul Hansen, reiðari á Bresti, er samdur.

Eitt prosent av einari millión er 10.000 krónur, so kann ein og hvør hugsa sær til, hvussu stóran mun hetta ger, tá ið hvør lemmatrolari bunkrar fyri 300.000-400.000 krónur til hvønn túr.

- Kreppan er so stór, at hetta klára vit ikki at koma burturúr við avtalum ímillum manningar og reiðarar einsamallur.

Marner Lisberg sigur, at tilboðið frá manningunum, gevur hvørjum lemmatrolara einar 200.000-300.000 krónur afturat um árið og tað er minni enn hvør troları brúkar í olju á hvørjum túri og tí skal nógv meiri til fyri at fáa bátarnar at loysa aftur.

Páll Hansen, formaður í Maskinmeistarafelagnum staðfestir, at samstundis, sum fakfeløg krevja hægri løn, tí at prísirnir eru so nógv hækkaðir, bjóða manningarfeløgini seg til at at fara niður í løn og talan er um eina lønarhækking, sum svarar til yvir 3%.